Kendi sangir og kvæði á fløgu

FLØGUÚTGÁVA
Tíðindaskriv

Í gjár kom út forvitnislig fløga á marknaðin.

Hetta er fløga við nøkrum av fremstu tónleikarunum innan jazztónleik í Føroyum, Finnlandi og Danmark.

Maðurin aftan fyri projektið er Edvard Nyholm Debess sum í fleiri førum fyrr hevur havt vælhepnað samstarv við norðurlendskar tónleikarar.

Edvard Nyholm Debess gjørdi m.a. í 2000 fløguna Debazz saman við donskum tónleikarum.

Hendan nyggja fløgan er eitt sindur øðrvísi enn Debazz, tá tilfarið á fløguni LÖG fyri allarstørsta partin eru vælkendir føroyskir sangir og kvæðir, sum vit øll kunna syngja við á. Allir sangirnir verða sungnir av Malan Thomsen, sum í nógv ár hevur verið við til at ríka okkum um føroyska sangskattin. Tónleikarliga er fløgan á høgum støði.

Til hesa fløga var stovnað Nordic END Quintet, sum, fyriuttan Malan Thomsen og Edvard Nyholm Debess er manna av jazztónleikarunum av allarfremstu rók í Danmark og Finnlandi.

Trummuspælari er danska legendan Alex Riel og á saxofon og klaver eru Eero Koivistoinen og Seppo Kantonen, sum í Finnlandi eru av mest brúktu og ferðandi tónleikarar í landinum.

Tónleikurin er lagdur tilrættis av Edvardi og Seppo Kantonen, og gevur hetta kendu føroysku sangunum og kvæðunum eina heilt nýggja dimensión. Teir hava lagt seg eftir at tilrættaleggja uttanum sangin, soleiðis at lagið í størsta mun verður varveitt sum tað var.

Vit verða m.a. stillisliga førd gjøgnum »Tú sangst eitt so vakurt.....« og »Ein Firvaldur í góðum lag«, meðan vit í »Flóvin Bænadiktsson« og »Brúðarvísuni« kenna stevið av føroyska dansinum, »Føroyar mín Móðir« er her í einari sera inniligari útgávu, og vit verða rættuliga førd út á hav við útgávuni av »Aldan«. Fleiri føroyskir sangir eru eisini á fløguni, fyriuttan at Edvard og Eero Koivistoien eisini hava hvør sítt upprunalag við. Hetta er ein sera forvitnislig fløga sum, samstundis at vera vælspæld, melodiøs og sanglig, brýtur uppúr nýggjum Ein góð blanding!

Fløgan LÖG við Nordic END Quintet verður sum tann fyrsta givin út á nýggja plátufelagnum Landing Duck Records og verður at fáa í handlunum um alt landið.

Eisini er hon at fáa í internethandlinum á
www.landingduck.com

Heimasíðan hjá Edvard Nyholm Debess sjálvum er á
www.debazz.com



Fóstbræður konsert í Norðurlandahúsinum

KONSERT
Tíðindaskriv

Konsert við kenda íslendska manskórinum »Fóstbræður« verður í Norðurlandahúsinum leygardagin 5. juli 2003 klokkan 16:00. Kórið »Fóstbræður« telist millum kendastu íslendsku manskórini. Kórið, sum er stovnað í 1916, hevur havt stóran týdning í íslendskum tónleikalívi, sum telur fleiri manskór, ið virka undir høgum og strongum krøvum til. Sjálvt teir mest at-finningarsomu ummælarar vilja verða við, at kórið »Fóstbræður« í samfull 85 ár ríkiligani hevur lokið hesi krøv, hóast kórið, sum telur 65 sangarar, byggir á áhugavirksemi.

»Fóstbræður«, sum á hvørjum ári hava konsertir í Reykjavík og úti um landið, hava givið út plátur og fløgur og hava sungið í útvarpi og sjónvarpi. Eisini hevur kórið samstarvað við íslendska Symfoniorkestrið og íslendsku Operuna. Í februar 2000 sungu »Fóstbræður« í Aida eftir Verdi, har Symfoniorkestrið spældi undir og Operakórið og altjóða solistar eisini medvirkaðu undir leiðslu av Rico Saccani.

Kórið sang eisini "Codex Calixtinus", sum byggir á handrit úr 13. øld, ið varð funnið í dómkirkjuni í Santiego de Campostella í Spaniu. Hetta verk varð framført í seks av teim kosnu evropeisku mentabýnum í 2000.

»Fóstbræður« hava ferðast víða í Evropa og Amerika. Triggjar ferðir hevur kórið fingið altjóða virðislønir, silvur í Llangollen í Wales í 1972, bronsu í Linderholzhausen í Týsklandi 1987 og gull í Prag 2001.

Síðani 1991 hevur Árni Harðarson stjórna kórinum. Árni er útbúgvin pianistur og tónaskald á Royal College of Music í London árini 1978-83. Eftir lokna útbúgving hevur hann verið virkin í íslendskum tónleikalívi sum lærari, tónaskald og kórleiðari. Í løtuni er hann leiðari á Tónleikaskúlanum í Kópavogi.

Atgongumerki til konsertina við íslendska manskórinum »Fóstbræður«, sum verður í Norðurlandahúsinum leygardagin 5. juli 2003 klokkan 16:00, kosta 100,00 krónur.

Ein øðrvísi mótaframsýning

MÓTAFRAMSÝNING
Tíðindaskriv

Tann 27. juni fer kendi føroyski sniðgevin Borgný Dam Patursson at hava mótaframsýning umborð á Norrønu.

Borgný sum er kend fyri síni tíðarleysu, sermerktu, framúrskarandi snið, hevur sniðgivið eina kolletión, sum er serliga framleidd til summarsiglingini hjá nýggju Norrønu. Hvørt einasta plagg er framleitt við hond av Borgný.

Grundtilfarið er seyðaullin, og hon kennir tann aldargamla siðararvin, ið er grundarlagið undir meirvirkan av ullini. Men samstundis torir hon sum nakar annar at ganga nýggjar leiðir. Kópaskinn, silki og fagurlitt klæði, tað sum sýnist ómøguligt at sameina verður tvunnið saman, og tað riggar, tá ið tað er Borgný sum fæst við tað, og tað er tað, ið gera hana so sermerkta, eitt eindømi. Tú sær, merkir, ja angar góðskuna, andan og listarliga íblásturin í pløggum hennara.

Aftanvert sølu og marknaðarføringina stendur Diana Borgnýardottir, dóttir Borgný, hon hevur sum aðalsetning at vera við til at lyfta støðið á Føroyskum klædnasniði, og vinna tí pláss á altjóða marknaðinum. Grundhugsjónin er einføld: »Vit vilja æra tað gamla, hugkveikja tað nýggja, og nøkta allan tørv og øll krøv til eina dygdarvøru, sum tað modernaða menniskjað setur«. Við hesum grundsetningi er fyritøkan farin til verka, vælvitandi at álítandi framleiðslulið, saman við einum sterkum sølu- og marknaðarliði, eru hornasteinurin aftanvert varðandi framburð í virkseminum.

Uttan sera gott samstarv við shop managerin Benny Eidesgaard hevði hetta neyvan komi í rættlag, hann stendur fyri alt fyrireikingarabiði til mótaframsýningina.

Heimarøktin styrkjast við samdøgursrøkt og økisterapi

HEIMARØKT
Tíðindaskriv

Heimarøktin verður víðkað til at fevna um samdøgursrøkt. Hendan ætlanin er partur av stavnhaldinum hjá sitandi samgongu, og nú verður farið frá orði til gerð.

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Páll á Reynatúgvu, hevur avgjørt at seta á stovn samdøgursrøkt, sum um stutta tíð verður partur av teimum tilboðum, ið verandi Heimarøkt kann veita.

Umframt samdøgursrøktina verður økisterapi eisini at finna millum tænastutilboðini hjá Heimarøktini í næstum.

Samdøgursrøkt

Í dag kunnu okkara eldru og onnur við tørvi á hjálp fáa vitjan av Heimarøktini um dagin og um kvøldið. At eingin hjálp fæst um náttina man vera til miklan ampa fyri nógv fólk, bæði tey eldru og teirra avvarðandi, sum mugu liva við tilvitanini um, at næturnar eru merktar av ótryggleika.

Við teirri komandi samdøgursrøktini vónar landsstýrismaðurin í almannamálum, at hesin ótryggleikin í fæst burtur við tað, at okkara eldru kunnu koma í samband við fólk við heilsu-útbúgving alt samdøgrið.

Samdøgursrøktin fer at gera umstøðurnar hjá heimabúgvandi eldri fólki tryggari, og fer eisini at geva teimum, sum hava tørv á røkt alt samdøgrið, ein møguleika at velja at verða heima heldur enn at vera á stovni.

Økisterapi

Økisterapi skal setast í verk í teimum 6 heimarøktarøkjunum kring landið. Talan verður um ergo- ella fysioterapeutar, sum fáa í uppgávu at skipa fyri uppvenjing og framhaldandi at røkja vunnan førleika hjá teimum, sum einhvørsvegna tørva viðgerð, eftirviðgerð ella fyribyrgjandi tiltøk. Ætlanin er eisini, at økisterapeutarnir fáa týdningarmiklan leiklut í nýskipanini av hjálpartólaøkinum.

At Heimarøktin verður styrkt við fysio- og ergoterapeutum, merkir eina munandi betraða tænastu til borgaran. Við hvørjum einstøkum brúkara í huga skulu økisterapeutarnir betra um møguleikarnar hjá fólki at vera verðandi í egnum heimi, tá heilsan bilar teimum. Eisini skulu økisterapeutarnir virka sum millumlið millum sjúkrahús og heim, tá ein sjúklingur er útskrivaður av sjúkrahúsi.

Tað slepst soleiðis undan óneyðugt at leggja fólk inn av nýggjum til eftirviðgerð. Økisterapeutarnir geva ráð og fyribyrgjandi viðgerð, antin heima hjá sjúklinginum ella aðrastaðni í nærumhvørvinum.

Sum longst í egnum heimi

Ynski hjá nógvum eldri fólki um at vera sum longst í egnum heimi er ein av orsøkinum til, at landsstýrismaðurin í almannamálum hevur gjørt av at styrkja tænastuútboðið frá Heimarøktini við økisterapi og samdøgursrøkt. »Summi av okkara eldru halda seg kanska ikki til at búgva fyri seg sjálvi, og onnur kunnu vera ov illa fyri líkamliga til at vera einsamøll undir lonini. Við møguleika at fáa røkt alt samdøgrið verða umstøðurnar hjá teimum tryggari«, sigur Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum.

Lýsingarnar eftir starvsfólki koma í bløðini fyrst í næstu viku, og so skuldi ikki long tíð gingið, áðrenn Heimarøktin fer í holt við at veita hesi tilboð til allar borgarar í Føroyum.

"Knallgode gytetall"

Soleiðis siga norðmenn um gýtingina hjá toski og upsa norðanfyri. Men líka so góð, sum tíðindini eru um toskin og upsan, eru tey tilsvarandi vánalig um sildina. Norðmenn hava nevniliga ikki sæð eina verri gýting hjá sildini síðan 1987. - Minkingin er dramatisk, siga norðmenn



Nógv er gýtt av toska-og upsaynguli í vár. Men við sildini gongur verri

GÝTING
Vilmund Jacobsen

Norðmenn eru væl nøgdir við gýtingina í ár, bæði hjá toski og upsa. Yvirskriftin sum "knallgode gytetall" eru at síggja í norskum bløðum.

Væleydnað

- Vit hava ongantíð sæð so nógvan toskayngul síðan 1992, og haraftrat kemur, at larvurnar eru fyrr klaktar í ár enn vanligt.

Petter Fossum, sum starvast hjá norska Havgranskingarstovninum, ávarar tó ímóti at brúka hesi tølini "blint", sum hann tekur til.

- Hjá okkum granskarum eru tølini í fyrsta lagi áhugaverd við atliti til útrokningar av gýtingarstovninum hjá toski. Tølini siga okkum, at gýtingin er væl eydnað. Tó gongur tað ikki altíð, sum roknað verður við. Onkuntíð hendir tað øvuta.

Upsin

Petter sigur, at gýtingin hjá upsanum hevur eisini verið óvanliga góð í vár.

- Líkt er til, at gýtingin er tvífalt so stór í ár sum seinasta ár, 4-5 ferðir størri enn í 2001 og 500 ferðir størri enn í 1997!

Størsti parturin av upsaynglinum er at síggja norðanfyri, og størst hevur talið verið á Vesterál-bankanum. Vanliga er mest at síggja á Halten-bankanum. Bert 2,8% av upsaynglinum er funnin sunnanfyri 62 stig. Síðan árin 2000 hevur yngulin sunnanfyri verið skiftandi, úr 17,7% upp í 66,8% av samlaðu nøgdini.

Petter sigur, at tað sama er galdandi fyri upsan sum fyri toskin.

- Eitt stórt tal av ynguli merkir ikki neyðturviliga, at gýtingarstovnurin verður tilsvarandi stórur um eini 5-7 ár. Men larvurnar siga okkum, at tað er eitt "potentiali" í stovninum.

Sildin

Men líka so góð, sum tíðindini eru um toskin og upsan norðanfyri, eru tey tilsvarandi vánalig um sildina.

Norðmenn hava nevniliga ikki sæð eina verri gýting síðan 1987.

Afturgongdin í gýtingini hjá sildini er dramatisk árini 2002 til 2003, úr 27.100 miljardum ynguli niður í 3.680 miljardir yngul.

Kapasiteturin í norsku fiski-og alivinnuni ov stórur á øllum økjum

Norski fiskimálaráðharrin, Svein Ludvigsen, dregur somu línu sum norsku bankarnir, ið fíggja fiskivinnuna. - Kapasiteturin er ov stórur á øllum økjum, bæði innan veiði, ídnað og alivinnu. Neyðugt er við tillaging til tær umstøður, ið eru

Norsku bankarnir eru samdir um, at kapasiteturin í norsku fiski-og alivinnuni er ov stórur í mun til marknaðin. Ein av bankunum, ið fundaðist við Svein Ludvigsen, fiskimálaráðharra, var Nordea

NOREG
Vilmund Jacobsen

Tíðliga í juni hevði norski fiskimálaráðharrin, Svein Ludvigsen, fund við størstu bankarnar í Noregi, sum eru við í fíggingini av norsku fiski-og alivinnuni. Evnið á fundinum, sum var á skrivstovuni hjá fiskimálaráðharranum, var kreppan í norsku vinnuni.

- Likviditetsskipanir er ikki loysnin, tí slíkar virka kappingaravlagandi. Kapasiteturin er ov stórur á øllum økjum, bæði innan veiði, ídnað og alivinnu. Neyðugt er at tillaga kapasitetin til marknaðin.

Fiskivinnunni tørvar ikki "hestakurar", og trupulleikarnir eru ikki eitt norðurnorskt fyribrigdi, men fevna um alla norsku strondina.

Norsku bankarnir halda, at ein nýggj skipan fyri flotan á nærleiðum hevði verið eitt stig á røttu leiðini hjá veiðiliðnum. Teir síggja helst sum eina tillaging til rávørugrundarlagið, sum longu er farin fram hjá langfaraflotanum.

Samljóð

Áskoðaninar hjá bankunum samsvara væl við málini í politikkinum hjá Svein Ludvigsen, fiskimálaráðharra.

Eisini í spurninginum um 50 laksaloyvi, sum eru leys at søkja, fær Svein stuðul frá bankunum. Hesi loyvi kosta teimum, sum vilja keypa tey og fara undir aling, 4-5 milj. krónur hvørt.

- Bankarnir søgdu, at teir vilja ikki verða við til at fíggja loyvir, har lønsemi ikki er nóg gott. Hesa áskoðan havi eg eisini. Er grundarlag ikki fyri nýggjum loyvum, verða tey heldur ikki latin. Tað verður eingin missur fyri nakran, um óbrúktu laksaloyvini ikki verða seld. Vil eingin hava tey, verða tey standandi óbrúkt, sigur fiskimálaráðharrin.

Bankarnir samdir

Norska fiskivinnuumsitingin fer nú at viðgera tað, sum bankarnir søgdu á fundinum.

- Bankarnir rópa ikki upp um kreppu, men teir viðganga, at norska fiski-og alivinnan er í eini truplari støðu, sigur Svein Ludvigsen, sum er talsmaður fyri tillaging í norsku fiskivinnuni, bæði á sjógvi og landi.

Tað vóru teir stóru bankarnir í Noregi, sum eru kendir í fiskivinnuhøpi, sum hendan dagin í juni fundaðust við Svein Ludvigsen, fiskimálaráðharra.

Bankarnir vóru samdir um tær stóru linjurnar mótvegis vinnuni.

Avstraliumenn verja koralrivini

AVSTRALIA
Vilmund Jacobsen

Avstralska stjórnin ætlar at styrkja um verjuna av, "Great Barrier Reef", sum er størsta koralriv í heiminum.

Í dag er umleið 5% av rivinum stongt fyri skipaferðslu og vinnuligum fiskiskapi.

Nú ætla avstraliumenn at økja um verjuna, soleiðis at 30% av rivinum verður friðað.

Tað er eisini uppá tal bert at lata granskarar við serligum loyvi sleppa at kanna tey 30%, sum ætlanin er at friða.

Granskarar meta, at Great Barrier Reef er størsta livandi "organisman" á jørðini.

Tungur fiskireiðskapur fer illa við koralrivunum kring um heimin.